# Oddagrein

Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo



# FORMA MOTIVINI EFTIR TØRVI

Tað liggur í skrivandi stund í kortunum, at vit fara at fáa eina minnilutastjórn, sum skal stýra landinum fram til valið, sum kanska verður í september. Miðflokkurin vísir áhuga at blíva ein beinleiðis partur av landsstýrinum, meðan Poul Michelsen í Framsókn sigst vera áhugaður í at stuðla samgonguni fram til valið.

Tað kann tykjast naivt, at ein minnilutastjórn skal kunna fáa stórmál ígjøgnum, sum ikki ber til við eini breiðari samgongu: Nevnd hava verið fiskivinnureformur, kommunureformur, skúlareformur og pensjónsreformur.

Sum vit hava nevnt so ofta, so hevur Fólkaflokkurin havt so gott tak á hinum trimum stóru flokkunum, at tað hevur verið fiskivinnupolitikkurin hjá Fólkaflokkinum, sum hevur verið førdur í øllum samgongum seinastu fimtan árini – undir fýra ymsum løgmonnum. Hesin pástandur er sjálvandi ein politisk eygleiðing, sum nú fer at vísa seg at vera sonn ella følsk. Allir hinir flokkarnir hava tosað um at broyta viðurskiftini – og allir tykjast so ella so tosa við einari tungu. Tí er lagaliga løtan júst nú, kunnu vit siga. Nú kunnu teir flokkar, sum finna saman uttan um Fólkaflokkin gjøgnumføra henda fiskivinnureformin, tað veri seg okkurt slag av tilfeingisbú, tilfeingisgjaldi o. s. fr.

Í løtuni tykist eisini at forma seg ein samgonga uttan um gomlu fullveldissamgonguna. Fólkaflokkurin verður settur uttan fyri alla ávirkan, um nýval ikki verður nakað skjótt. Hinvegin sær Tjóðveldi út til at verða enn meira isolerað, enn tey hava verið seinastu átta árini.

Um løgmaður klárar at telva seg til eina samgongu við Miðflokkinum og við Framsókn sum stuðulsflokki, so kann hann prógva, at hann kortini er ein sterkur leiðari, sum klárar at fáa politiska ávirkan.

Tað kemur væl við hjá Javnaðarflokkinum, um nýggi formaðurin klárar at vísa á nøkur úrslit síðstu mánaðirnar fram til valið. Hann hevur klárað seg væl við at vera



siðiligur og róligur. Miðflokkurin kann bara spæla við samgonguætlanunum – og so tryggja seg við at leggja fót fyri málum sum at bryggja sterkt í Føroyum, hvar úthurðin í Rúsini skal vera og tryggja sær at fosturtøkulógin ikki verður linkað. Mál, sum hinir klára at svølgja. Reint sosialt er Miðflokkurin ikki øðrvísi enn Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin.

Poul Michelsen fær tað burturúr, at hann vinnur tíð fram til valið – og hann fær hildið Fólkaflokkinum í skammilkróki so leingi sum gjørligt.

Politikkur snýr seg – tá alt kemur til alt – um vald, tí vald gevur ávirkan – og skapar broytingar. Motivini verða formað so hvørt eftir tørvi.

**» Politikkur snýr seg um at halda seg til maktina**

# Skál fyri ítróttinum – og skít verður við heilsuni!

Tá ÍSF tosar um kostár og at fáa franskar hotdogs og chips út úr ítróttarhallum og av fótbóltsvallum, so man tað í besta lagi vera talan um reyp, ynskidreymar, skemt ella sarkasmu.

Tí ítróttarfeløgini meina als einki við tað. Í Havn hava vit tvey stór professiónell fótbóltsfeløg, sum brúka milliónir at keypa fótbóltsspælarar fyri. Men tá tey tosa um sunnar kostvanar, so er tað ein býur í Kina.

Tí í staðin fyri at viðra kostárið og vísa, at tey veruliga meina nakað um sunnar heilsuvanar og sunnan kost, so skála tey beinleiðis við og fyri fótbóltinum. Tey eggja sínum viðhaldsfólki at drekka eina skál saman við fótbóltinum. Tey hava opna barr í felagshúsinum, og so lýsa tey við rúsdrekka á búnunum hjá bestu fótbóltsleikarunum.

Altso halló B36 og HB! Skulu fyrimyndirnar hjá lítlum HB'arum og B36'arum vera menn, sum renna runt á vøllinum og drekka øl? Man má spyrja, um nakar er heima hjá oddafólkunum í hesum stóru ítróttarfeløgunum. Meðan leikararnir á vøllinum eru rennandi rúsdrekkareklamur, viðhaldsfólkið gongur við góðum gearara rundan um vøllin, og dunsturin av øli og snapsi stendur úr felagshølinum, har hundraðtals børn hava sína dagligu gongd.

Á heimasíðuni hjá ÍSF stendur tað so pent, sum ítrótta- og ungdómsráðgevin hjá ÍSF, Annika H. Lindenskov, sigur:

*» – Tað hevur ómetaliga stóran týdning, at fyrimyndirnar hjá teimum ungu geva tey røttu signalini. Fáa vit úrvalsítróttafólk okkara – spælararnar í teimum bestu deildunum – at skilja fult út hvussu týdningarmikið tað er, at tey framtraðka sum fyrimyndir, er nógv vunnið.«*

Tá ÍSF kortini einki meinar við hatta sunna, so droppa tað og sigið sum føroyameistararnir vilja hava okkum at siga: Skál fyri ítróttinum og skít verður við heilsuni!





**» Bambi-Føroyar**

BJARNI DJURHOLM
KJAK Á SÍÐU 23



**» Politiskar nýskipanir**

UNI ARGE
VIKUSKIFTI SÍÐA 24-25

# 34 milliónir til Bakka-feðgarnar



Bakkafrost hevur havt eitt gott ár í fjør, og Bakkafrost er veruliga ein risi í føroyska búskapinum. Bakkafrost er nógv tað størsta felagið í Føroyum við einum marknaðarvirði upp á 2,5 milliardir krónur og 400 starvsfólkum. Felagið stendur fyri 20 prosentum av samlaða føroyska útflutningsvirðinum.

At tað eru knotur í Bakka-monnunum og hava teir væl og virðiliga prógvað, og at felagið hevur stórt virði og stórt yvirskot merkist eisini hjá partaeigarunum. Størstu føroysku íleggjararnir eru Havsbrún við sløkum 17 prosentum og Hans og Regin Jacobsen við umleið 9 prosentum hvør.

Av teimum 191 milliónunum, sum felagið útlutar í vinningsbýti, fær Havsbrún 32,5 milliónir krónur, og feðgarnir báðir, Hans og Regin Jacobsen góðar 17 milliónir hvør.

# Johannesen-bandin stýrir

KaJ Leo Johannesen er løgmaður. Aksel V. Johannesen er varaløgmaður og fíggjarmálaráðharri. Og John Johannesen er landsstýrismaður í heilsumálum.

Soleiðis eitur meirilutin av teimum landsstýrinum í løtuni Johannesen. Trý av seks landsstýrisfólkum eita Johannesen, og teir eru meirlutin, tí løgmaður hevur avgerandi atkvøðuna, skuldi staðið á jøvnum.



Sosialurin
Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,** sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*